Í stuttum

# Hægsta hús í penganeyð



Byggingin av hægsta húsi í Danmark hevur fingið trupulleikar við fíggingini. Lighthouse í Århus skal vera 142 metrar høgt, og skal gerast ein ímynd av jútska býnum, men nú hevur felagið aftanfyri byggingina fíggjarligar trupulleikar. Tað knípur við at skaffa tær 410 milliónir krónurnar, sum Århus Kommuna skal hava fyri byggingina, men nú hevur kommunan longt freistina fyri at gjalda.

# Kona Fogh skal dansa



Anne-Mette Fogh, sum er kona danska forsætisráðharran Anders Fogh Rasmussen, skal verða við í næstu røð av sjónvarpssendingini Vild Med Dans, sum verður send í heyst.

- Eg gleði meg til at møta øllum hinum luttakarunum og verða við í nøkrum positivum, sigur Anne-Mette, sum viðgongur, at hon segði ja upp á standandi fót, tá hon varð spurd um at verða við í Vild Med Dans.



# Kidman skal lokka ferðafólk

Avstralska ferðavinnan hevur stórar vónir um, at nýggi kærleiksfilmurin hjá Baz Luhrmann "Australia" fer at gera landið meira kent millum fólk, og at fleiri ferðafólk fara at vitja landið, eftir at filmurin hevur havt frumframsýning í november. Seinastu tíðina hevur Avstralia nevniliga havt trupulleikar við at fáa ferðafólk at vitja landið. Nicole Kidman og Hugh Jackman hava høvuðsleiklutirnar í filminum. - Milliónir av fólki fara ivaleyst at síggja filmin og tískil sleppa tey eisini at síggja nakrar minni kendar síðir av avstralsku náttúruni, umframt at tey eisini fáa eitt innlit í avstralsku søguna, sigur ferðavinnuráðharrin Martin Ferguson.

# Elton John selir flygil




Tónleikarin Elton John er virkin í stríðnum ímóti aids í Afrika, og nú stuðlar hann hesum arbeiði við at selja eitt av sínum flyglum á uppboðssølu. Elton John hevur brúkt hetta flygil til fleiri live-framførslur hjá sær, og nú skal tað seljast á eBay. Roknað verður við, at ljóðførið verður selt fyri umleið eina hálv millión krónur.

# Anga sum Angelina



Saman við stóra franska felagnum Coty hevur Angelina Jolie skrivað undir ein sáttmála um at gera sína heilt egnu parfumu. Sambært bretska blaðnum Mail on Sunday fær Angelina sjálv nógv at siga um, hvussu parfuma hennara skal verða.

- Angelina vil sjálv sleppa upp í part, tí hon vil gera eina parfumu, sum hon følir, veruliga er hon, sigur ein kelda.

Angelina er tó ikki tann fyrsta, sum samstarvar við Coty. Eisini Celine Dion, Sarah Jessica Parker, Jennifer Lopez, Shania Twain og Kylie Minogue arbeiða saman við Coty um seriur teirra innan anga.

Sosialurin